## Framúrskarandi Harry Potter

**Tann seinni filmurin um Harry Potter er betri enn tann fyrri. Hann er spennandi og skemtiligur og tú verður ofta tikin á bóli**

UMMÆLI
*Birita í Dali og Mariann Mortensen*

Nú kanst tú aftur fylgja Harry Potter á enn einum spennandi ári í Hogwarts.

»Harry Potter og kamarið við loynidómum« er annar filmur um tann unga gandakallin, Harry Potter.

Harry leingist eftir at vera saman við bestu vinum sínum Ron Weasley og Hermione Granger. Harry undrast yvir, hví hann einki bræv hevur fingið frá teimum alla summarfrítíðina, men hetta vísir seg seinni at hava eina undarliga orsøk.

Ikki dámar Harry at vera í Privetgøtu hjá gubbanum, gummuni, harra og frú Dursley, og teirra forkelaða soni Dudley, systkinabarn Harry. Gott verður at sleppa undan gerandisskeldinum og arganini.

Mest av øllum gleðir Harry seg at byrja annað árið í Hogwarts, skúlanum fyri gandakynstur og galdralist, men ikki gongst sum ætlað. Tí fyrst roynur onkur at forða honum at sleppa aftur í skúlan, og tá tað hóast alt eydnast, verður næstan einki sum áður.

### Betri enn tann fyrri

Óndar maktir gera um seg á skúlanum og leggja seg eftir næmingum av muglaraætt. Í øllum hurlivasanum finnur Harry útav, at hann hevur enn eitt óvanligt gandaevni, sum tann óndi, mæti Voldemort yvirførdi honum, tá Harry var smábarn.

Í byrjanini kemur hetta gandaevnið honum ikki til góðar, men ger tvørturímóti, at mangir vinir venda honum ryggin. Ikki verður lættari, tá Harry verður mistonktur at vera hjálparmaðurin hjá tí ónda gandakallinumVoldemort.

Vit í Sosialinum vóru til frumsýningina av »Harry Potter og kamarið við loynidómum«, og vóru samd um, at hesin filmurin er munandi betri enn tann fyrri »Harry Potter og vitramannasteinurin.«

### Lættur at skilja

Filmurin er sera lættur at skilja, og hevur ikki fløkt innihald. Sjálvt um filmurin vardi næstan 3 tímar, virkaði hann yvirhøvur ikki langdrigin. Um tú hevur lisið bókina »Harry Potter og kamarið við loynidómum« er tað lættari at skilja filmin, tí í filminum mangla nógv brot, sum eru í bókini.

Filmurin var spennandi og rættiliga skemtiligur. Og av og á blivu vit kløkk.

Munurin á fyrsta og øðrum filmi er, at annar filmur fer longri inn í dýpdina í ævintýraheiminum.

»Harry Potter og vitramanna steinurin« er grundarlagið undir Harry Potter heiminum, tí har varð nógv gjørt burtur úr at greiða hyggjaranum frá um filmin, við at lýsa støðini og verurnar. Persónarnir, Hogwartsskúlin, quidditch spælið og yvirhøvur hvussu gandaheimurin virkar skuldi lýsast, so ein kann liva seg inn í teir komandi filmarnir.

Í »Harry Potter og kamarið við loynidómum« sært tú meira til eitt ævintýr við eini rættuligari søgugongd, tí tú kennir teg aftur.

Filmurin um Harry Potter tekur teg á bóli, vit vóru bæði spent og bilsin og fóru væl nøgd til húsar.




# Tann rami gandur

**Harry Potter rúnarbindur børn og vaksin í næstan tríggjar tímar. Næsti filmurin í røðini um tann dámliga gandakallin við tí heimskenda arrinum í pannuni er uppaftur betri enn tann fyrri, halda børnini. Hevur tú lisið bøkurnar um Harry Potter, kanst tú róliga fara í biograf. Tú keðir teg ikki eitt sekund**

FRUMSÝNING
*Ingi Rasmussen*

»Eg gleði meg longu til nummar 3 kemur!«

Frumsýningin av filminum "Harry Potter og kamarið við loynidómum" er bara nakrar fáar minuttir gomul, tá 7 ára gamli síðumaðurin í berum ovfarakáti gevur filminum sítt allar besta viðmæli.

Orðini eru samstundis ein staðfesting av tí stóra spenningi, sum leingi hevur verið. Tann síðsti mánaðurin hevur verið ein long Harry Potter-niðurteljing, og endiliga sleppa vit aftur inn í hendan magiska heimin við talandi málningum, sveimandi ljósastakum og quittich – eitt bóltspæl á kustaskøftum.

Lat tað bara vera sagt beinanvegin: Børnini við mína lið pipraðu, flentu, kløkkaðust og gleddust í samfullar 160 minuttir, sum filmurin tekur.

### Trokan í høll

Tað er í grundini tann rami gandur, at Harry Potter megnar at varðveita áhugan hjá bæði smærri og størri børnum í næstan tríggjar tímar. Tað einasta, ið virkar ov langdrigið, eru steðgirnir, sum eru óneyðuga langir. Men Havnar bio skal eisini leingi liva.

Longu áðrenn filmurin byrjar, følir tú tætta spenningin í luftini, sum angar av søtum poppkorni. Hóast góð tíð er eftir, er longu fult í forhøllini, har børnini trokaðust sum í gomlum døgum. Tað er sum til frumsýning í útlondum, og útselt var fleiri dagar áðrenn fyrstu sýning. Enn er útlendski galladámurin kortini ikki heilt komin til Havnar, so hattarnir, kustarnir og gandastavirnir eru eftir við hús, men onkur hevði latið seg í Pottertroyggjuna.

### Tutl og tesk

Tá filmurin byrjar klappa børnini í spontanari gleði. Tey kunnu ikki lata vera.

Meðan filmurin gongur, hoyrist suði alla tíðina. Tutl og tesk frá foreldrum, sum umseta og forklára, og børnum, sum spyrja ella geva sína meining til kennar.

»Harry snakkar so snedigt.« »Ja, og hann er blivin so stórur«, siga tey bæði 7 og 9 ára gomlu báðu megin við, fyrstu ferð tey síggja Harry aftur aftaná eitt heilt ár. Men tað er ikki so løgið. Harry er farin í pubertetin, og fyri hvørt ár sum gongur, til allir lovaðu sjey filmirnir hava verið, verður hann eitt ár eldri – líka sum børnini sjálv. Tað sama eru Ron og Hermione, hansara góðu vinir. Tey umboða tað góða, og í felag berjast tey saman við øðrum góðum kreftum móti teimum óndu. Voldemort. Bara navnið fær tað at skelva í stólarekkjuni.

Hesaferð verður tað til stríð við eitt stórt ódjór, og ta løtuna gibbaði tað fleiri ferðir í børnunum. Men uttan at avdúka ov nógv so endar alt gott, og hjartanemandi er tað eisini onkra løtuna.

### Aftur til bókina

Aftaná ivast børnini ikki. Hatta er tann besti filmurin, tey nakrantíð hava sæð. Og tey fara enntá so langt sum at siga, at hann er nógv betri enn tann fyrri.

Kanska hava tey rætt. Hesaferð er ikki neyðugt at spilla tíðina við at forklára alt universið og persónarnar. Farið verður beint til søguna, tí vit kenna teir rotnu muglararnar, sum eru vit gandaleysu, og so teir spennandi lærararnar, næmingarnar og livandi deyðu á Hogwarts, skúlanum fyri gandakynstur og galdralist.

»Eg má síggja hann aftur,« eru tey skjót at siga, tá vit aftur standa uttanfyri í muglaraverðini.

Tíverri mugu vit bíða eitt heilt ár, áðrenn tann triði filmurin í røðini kemur. Men vit kunnu troysta okkum við, at tann fjórða bókin á føroyskum kemur fyrsta dagin. Og er tað nakað, sum er betri enn at fara í biograf saman, so er tað at lesa bøkur saman.









## Harry Potter slær øll met

**Biografhugurin hjá føroyingum er rættiliga komin fyri seg aftur, staðfestir Louis Jacobsen úr Havnar bio. Tað er Harry Potter eitt livandi prógv um. Fyrsta vikuskiftið sóu útvið 2000 fólk tann næsta filmin um lítla gandakallin, og tað er væl størri áhugi enn fyrru ferð**

POTTER-FEPUR
*Ingi Rasmussen*

– Hetta er nógv størri enn 1'arin.

Louis Jacobsen úr Havnar bio er væl nøgdur í hesum døgum. Filmurin »Harry Potter og kamarið við loynidómum« hevur fingið fólk í biografin sum ongantíð áður.

Fríggjadagin, leygardagin og sunnudagin vóru tríggjar sýningar hvønn dag, og fult var til allar sýningar uttan ta seinastu náttarsýningina sunnukvøldið, tí fólk skulu til arbeiðis tíðliga morgunin eftir.

1969 fólk hava sæð Harry Potter um vikuskiftið, og mánakvøldið var aftur útselt til báðar sýningarnar. Um vit roknað mánakvøldið uppí, so hava 2330 fólk sæð næsta filmin um Harry Potter fýra teir fyrstu dagarnar, og tað man vera met. Fyrsti filmurin um Harry Potter savnaði »bara« 1540 fólk tað fyrsta vikuskiftið.

– Tey vaksnu eru farin at dáma Harry Potter sera væl, og tað ger munin, tí tað eru nógv fleiri vaksin í biograf hesaferð. Sostatt eru eisini nógv í salinum til tær seinastu kvøldsýningarnar, sum enda rættiliga seint, sigur Louis Jacobsen.

Nógv fólk hava keypt atgongumerki í forsølu, men sambært Louis Jacobsen er áhugin uppaftur størri fyri Ringanna harra, sum verður frumsýndur miðskeiðis í desember.

– Vit brúka vanliga ikki tað at selja atgongumerki frammanundan, men vit gera eitt undantak við hesum báðum filmunum, tí áhugin er so stórur, sigur Louis.

»Harry Potter og kamarið við loynidómum« verður sýndur til 16. desember, tá Ringanna harri kemur á lørifti. Fyrst verður 1'arin sýndur umaftur, og so kemur 2'arin.

Havnar bio hevur lagt seg eftir at hava frumsýning saman við restini av heiminum. Tað er ikki dýrari, men Havnar bio skal bara lúka kravið um, at pláss skal vera til minst 200 fólk, og filmurin skal sýnast minst tvær ferðir.

– Fólk hava tikið væl undir við, at vit hava heimspremierur. Yvirhøvur er biografhugurin rættiliga komin fyri seg aftur í Føroyum. Serliga tey ungu fylgja væl við, hvat rørir seg í filmsheiminum, og tey vita akkurát, hvat er á skránni úti í heimi. Tað vísir seg eisini, at tað, sum er væl umtókt í USA, verður væl móttikið í Føroyum, sigur Louis Jacobsen.

Hann er spentur, til Ringanna harri kemur. Beint nú er hann glaður fyri, at Harry Potter gandar lív í Havnar bio.

## 3-arin helst seinkaður

Eitt ár gekk millum filmirnar »Harry Potter og vitramannasteinurin« og »Harry Potter og kamarið við loynidómum«, sum hevði heimspremieru í Havnar bio fríggjadagin.

Tað hevur alla tíðina verið ætlanin, at sjey bøkur skulu skrivast og sjey filmir skulu gerast um gandakallin við brillunum og tí kenda arrinum.

Eitt ár skal ganga ímillum hvønn filmin, men líkt er til, at tað verður torført at halda hesa tíðarætlan.

Triði filmurin eitur »Fangin úr Azkaban«. Higartil hevur Chris Columbus leikstjórnað filmunum, men hann letur nú Carlos Cuarón úr Meksiko yvirtaka uppgávuna.

Harafturat skal ein avloysari finnast fyri Richard Harris, sála, sum meistarliga hevur leikt Albus Dumbledore, ið er tann góðsligi og rættvísi rektarin á Hogwarts.

Harry Potter sjálvur, leiktur av Daniel Ratcliffe, skal eisini hava tíð at finna seg til rættis á einum privatskúla, sum hann júst er byrjaður á, so alt bendir á, at tað verður torført at verða liðug til ætlaðu tíðina.

Kortini verður roknað við, at filmurin kann gerast liðugur til desember næsta ár, so heilt galið verður tað neyvan.

*-ir*